# Søgan um hini er søgan hjá okkum øllum

HØGNI HOYDAL



**ST-sáttmálin um rættindi hjá teimum, ið bera brek, er viðgjørdur á Løgtingi. Verður rætt borið at, kann hann gerast eitt markaskjal í føroyskari samfelags- og rættarsøgu**

Ein drúgv tilgongd fór fram, áðrenn Sameindu Tjóðir fyri nøkrum árum síðan samtyktu nýggjasta altjóða rættindasáttmálan. Hesaferð eydnaðist at semjast um sáttmálan um rættindi einstaklinga, ið bera brek.

Nú eru lond í heiminum farin at seta sáttmálan í gildi - og í hesi vikuni høvdu vit í Løgtinginum høvi at viðgera sáttmálan og royna at fáa hann settan í gildi í Føroyum. Ein nevnd við umboðum úr Uttanríkisráðnum, øðrum stjórnarráðum og umboðum frá MBF, hevur í meira enn hálvt annað ár arbeitt við at lýsa krøvini til føroyskar myndugleikar og hevur flutt sáttmálan í føroyskt mál. Nevndin hevur gjørt eitt gott arbeiði, hóast málsliga parturin tørvar eina køna hond afturat, og krøvini til nýggja lóggávu og broytingar tykjast íðan og lítið nágreinað enn.

**Sama rætt og frælsi at virka, velja og virðast**

Talan er um ein sáttmála, sum byggir á m.a. sjálvan stovningarsáttmálan hjá ST, á altjóða mannarættindayvirlýsingina, á sáttmálan um búskaparlig, politisk og mentanarlig rættindi, á sáttmálan um rættindi barna og fleiri aðrar altjóða sáttmálar.

Grundleggjandi byggir hann á somu algildu virðir, sum aðrir av sáttmálum ST's: At hvørt einstakt menniskja hevur somu grundleggjandi virðir og rættindir, og at øll eiga dygdir, uttan mun til hvussu vit eru fødd, ella hvussu lagnan hevur lagt okkara leiðir.

Sáttmálin ásetur krøv til samfelagið, sum kunnu geva øllum sama rætt og frælsi at virka, velja og verða vird. Alt frá rættinum til samskifti, atkomumøguleikar, útbúgving, bústað, arbeiði, virkna luttøku í samfelagnum - og ikki minst: Rættin til privatlív og ymiskleika og verju móti mismuni í øllum almennum viðurskiftum.

Sáttmálin leggur somuleiðis dent á, at talan er ikki um serrættindi, men um somu rættindi sum onnur, og at serlig atlit skulu takast til einstaklingar og samfelagsbólkar, sum kunnu vera fyri margmismuni - t.e. sum bæði bera kropsligt ella sálarligt brek, men eisini vegna sítt kyn, sín húðalit, sín aldur ella sína sannføring og persónleika, hava skerd rættindi og virðing í samfelagnum.

**Frá orði til atgerð**

Lopið frá teimum frálíku og væl orðaðu málunum í ST-sáttmálanum til ítøkiligar broytingar í samfelagnum, er sjálvsagt stórt og vítt. Í uppskotunum frá nevndini, ið hevur viðgjørt hann í Føroyum, er dentur lagdur á, at ein røð av lógarbroytingum skulu gerast, og at hagtøl og skjalfestingar regluliga skulu útvegast um veruligu støðuna í Føroyum. Hartil verður dentur lagdur á virðis- og upplýsingarátøk í skúla og samfelag, sum støðugt skulu fremjast.

Undir viðgerðini á Løgtingi komu fleiri góð uppskot um, hvussu sáttmálin beinanvegin kann fylgjast upp við ítøkiligum átøkum. John Johannesen úr Javnaðarflokkinum helt, at ein virkisætlan átøk henni, sum gjørd er á orkuøkinum: "Skjótt syftir seiðir og tunga takið" - eisini eigur at gerast viðvíkjandi framtøkum fyri tey, ið bera brek. Altso at skjóta upp, hvat kann gerast skjótt og hvat tekur drúgva tíð. Eitt gott hugskot.

Undirritaði førdi fram, at vit eiga at seta sum krav til øll lógaruppskot á tingi yvirhøvur, at tey skulu lýsa avleiðingar fyri fólk, ið bera brek og fyri javnstøðu, eins og krøv longu er í dag um, at lógaruppskot skulu lýsa fíggjarligar, vinnuligar, umhvørvisligar, sosialar og økisligar avleiðingar. Rættindi hjá førleikaskerdum eiga at verða eitt eins innvovið og náttúrligt atlit í øllum almennum átøkum og lógum, sum onnur atlit, ið vit arbeiða við í dag.

Eisini viðgjørdu vit eitt nú rættin til samskifti. Hví læra vit tildømis ikki øll teknmál - í hvussu er so dánt, ella grundreglurnar - í fólkaskúlanum?

**Altjóða eftirlit og kærumøguleiki**

Saman við ST-sáttmálanum er eisini gjørt eitt sonevnt "Sjálvboðið frumskjal", har einstøku londini kunnu velja at binda seg til, at einstaklingar kunnu kæra til eina serliga ST-nevnd, um teir hava troytt allar møguleikar í sínum landi at fáa sín rættindi viðurkend.

Uttanríkisráðið hevur mælt til, at Føroyar eisini ganga undir hetta sjálvbodna frumskjalið, og tað taka vit í Tjóðveldi sjálvsagt fult undir við, eins og vit arbeiddu fyri, tá vit umsótu málið í landsstýrinum. Altjóða sáttmálar fáa ikki fult virði og broytingarmegi, um vit ikki samstundis vilja standa til svars mótvegis altjóða stovnum og eftirmetingum.

Tó er sera ivasamt, um hetta frumskjalið verður sett í gildi fyri Føroyar, tí Danmark vil ikki seta hendan partin í gildi - og tað er gjøgnum Danmark, at hesin sáttmálin er ætlaður at galda fyri Føroyar. Tí verður nú ein veruligur royndarsteinur, hvørt samtykt Løgtingsins fær gildi, tí eg ivist ikki í, at eitt samtykt Løgting fer at taka undir við bæði sjálvum sáttmálanum og sjálvbodna frumskjalinum.

**Vit hava allar fortreytir at ganga undan**

Samanumtikið kann ST-sáttmálin um rættindi einstaklinga, ið bera brek, gerast eitt veruligt markaskjal í føroyskari samfelags- og rættarsøgu. Hann eigur at verða lopfjølin hjá okkum øllum at siga: Vit vilja ganga fremst millum heimsins tjóðir, tá ræður um rættindi hjá fólki, ið bera brek. Vit hava allar fortreytir fyri at gera tað í einum gjøgnumskygdum samfelag, har ongin kann skjúgvast av vegnum uttanfyri eygu okkara, men har vit kenna hvønn einstakan og kunnu virða dygdirnar og íbornu tignina hjá øllum.

Hetta er ein víðsjón, sum higartil er borin av einstøkum eldsálum, avvarðandi og starvsfólki almennu skipanunum. Hendan víðsjónin skal nú eisini gerast politisk ábyrgd hjá øllum myndugleikum í landinum - hóast tað fer at taka tíð og krevja stór tøk.

Doris Hansen skrivaði frálíku bókina, "Søgan um hini", um stríðið hjá eldsálunum, tá ein partur av teimum, ið bera menningarbrek, sluppu heim til Føroya, heldur enn at verða flutt út um okkara sjónarring.

Nú er stundin komin, at vit sláa rimmarfast, at søgan um hini, er søgan hjá okkum øllum.

# ALS var sanniliga eitt politiskt átak

JÓANNES EIDESGAARD
landsstýrismaður



Líkt er til, at nógvu leiðararnir í Sosialinum seinastu tíðina hava valt ein heilt nýggjan stíl, har boðskapurin er, at lítið og einki gott kemur frá politikarum yvirhøvur. Men hvussu gjarna blaðið vil seta politisku skipanina í ringt ljós, so fær blaðið tó ikki broytt teir veruleikar, sum nú einaferð eru.

Leiðarin í Sosialinum í gjárkvøldið, sum viðgjørdi ALS, var í so máta einki undantak. Hesin vil vera við, at tað skuldi ein ræðulig kreppa til fyri at lata eyguni upp á politikarunum, soleiðis at farið varð undir at skipa arbeiðsloysisskipanina ALS. Hetta er ikki rætt og er ein beinleiðs reingjan av tí, sum fór fram.

Uppskot um stuðul til arbeiðsleys hevði verið frammi manga ferðir áður, tó uttan at nakað spurdist burturúr. Fyrstu ferðina longu áðrenn kríggið. Men tað er rætt, at serliga borgarligu flokkarnir vóru ikki serliga hugaðir fyri slíkari skipan, og tí fingu hesar tankar ikki undirtøku.

Tá landsstýrið varð skipað í januar 1991 millum Javnaðarflokkin and Fólkaflokkin, høvdu vit við í okkara samgonguskjali, at farast skuldi undir at seta eina arbeiðsloysisskipan á stovn. Sjálvur fekk eg sum landsstýrismaður í arbeiðsmarknaðarmálum uppgávuna at loysa hetta mál og varð farið undir hetta arbeiðið beinanvergin.

Men enn einaferð vóru ikki allir flokkar eins heitir fyri at fáa slíka skipan. Tað vóru teir politikarar, sum hildu, at arbeiðsloysið neyvan fór at raka okkum í Føroyum og bert okkara grannar, og uppaftur aðrir hildu, at ein arbeiðsloysisskipan fór at eggja fólki til ikki at tíma at arbeiða.

Eg setti ein arbeiðsbólk niður við umboðum fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum, og kom hesin bólkur eftir rættiliga drúgvt og grundleggjandi arbeiði til eitt álit, sum so seinni gjørdist til eitt lógaruppskot. Hetta uppskot legði eg fram á ting, og varð tað samtykt í mars 1992. Hesin arbeiðsbólkur, sum partvíst eisini gjørdist fyrsta stýrið fyri ALS, eigur stóran heiður og tøkk fyri, at ALS gjørdist tann góða skipan, sum ALS nú einaferð gjørdist.

Stóra hóttarfallið, sum kom 6. okt. 1992, kom aftaná, at skipanin var sett á stovn. Tað er væl einki at ivast í, at ALS kom alt ov seint og átti at verið komin mong Harrans ár frammanundan. Vit fingu skjótt risastórt arbeiðsloysi upp á heili 25%, og tí var skipanin frá fyrsta degi í sera tungum sjógvi. Neyðugt var við krepputiltøkum til tess ar bjarga ALS, men tað gekk, og nú eiga vit eina væl konsolideraða skipan við á leið 700 mió. kr. Eg eri eisini sannførdur um, at ALS lutvíst var medvirkandi til, at ein ávísur broddur varð tikin av avleiðingunum av stóru kreppuni í 90´unum.

So tað var ikki kreppan í 90´unum, sum fekk okkum at fara undir at fyrireika ALS, men tí at vit í tí samgonguni høvdu greiða avtalu og ætlan um slíka skipan.

Annars eri eg samdur við Sosialin í tí, at lógarbroytingarnar um ALS, sum nú liggja í tinginum, eru skilagóðar og neyðugar, og vónandu vinna tær frama.

Tað er nú einaferð sera trupult at reingja ein søguligan veruleika.

# Nú er at smíða, meðan jarnið er heitt

HEÐIN MORTENSEN
borgarstjóri í Tórshavnar kommunu



Endiliga røkist fyri, at eldraøkið verður lagt út til kommunurnar at umsita, og tað er upp á tíðina, tí við verandi samanblanding av valds- og gjaldsbýti, ber illa til at gera nakað. Vit í Tórshavnar kommunu eru til reiðar at fara í gongd beinanvegin.

Øll eru greið yvir, at nakað má og skal gerast á eldraøkinum her og nú, og serliga hjá okkum í Suðurstreymoy er talan um átroðkandi loysnir, tí akutti tørvurin er blivin so stórur. Tí er tað gleðiligt, at tað endiliga røkist fyri, at eldraøkið verður lagt út til kommunurnar at umsita.

Síðani 2000 hava vit bíðað eftir, at landsmyndugleikarnir vildu spæla við, tí tá vit yvirtóku barnaansingarøkið, lá í kortunum, at landið skuldi taka sær av eldraøkinum. Har er tíverri bara hent millum lítið og einki, samstundis sum vit við barnaansingini hava víst í verki, at vit megna uppgávurnar, bara vit fáa tær.

Tí fegnist eg um, at landsstýriskvinnan í almannamálum, Rósa Samuelsen, er til reiðar at leggja eldraøkið út til kommunurnar. Samstundis er greitt, at tá kommunurnar skulu taka sær av økinum, skulu pengarnir eisini fylgja við, í greiðum gjaldsbýti, tað er ikki blokkstuðul, so tí gleða vit okkum til at sleppa í gongd sum skjótast.

**Klárt at byrja**

Verður borið skjótt at frá landsins síðu, so tilsøgn verður givin um neyðuga stuðulslánið, kunnu vit hava 64 røktarheimspláss klár úti við Strond um áleið eitt ár, og tað loysir so at siga allan tann akutta tørvin.

Men vit ætla okkum ikki at steðga har, tí málið er at finna fleiri breiðar og dygdargóðar loysnir, ið fremja varandi batar á øllum eldraøkinum í Suðurstreymoy.

Eisini í tí sambandi er gleðiligt at kunna staðfesta, at tann nógv umrøddi og leingi eftirbíðaði íbúðarpakkin langt um leingi kemur ígjøgnum í Løgtinginum, so vit kunnu sleppa at arbeiða við alternativum loysnum, ið geva varandi og fyribyrgjandi úrslit.

Her kann eg nevna, at vit hava eitt prosjekt liggjandi klárt, sum fevnir um 65 eldraíbúðir í Berjabrekku til eldri og onnur trongjandi. So skjótt viðurskiftini viðvíkjandi rentustuðli og meirvirðisgjaldi eru avgreidd, eru vit til reiðar at seta tað arbeiðið í gongd.

Haraftrat eru vit eisini klár við fleiri vardum íbúðum á Boðanesi, so skjótt góðkenningin frá landsmyndugleikunum fer fingin upp á pláss, umframt at aðrar loysnir eisini eru á borðinum.

**Eina breiða viftu**

Óneyðugt er við fleiri kanningum á økinum, tí nú ræður um at smíða, meðan jarnið er heitt. Allar kanningar seinnu árini hava eisini víst, at tey eldru ynskja at verða verandi heima hjá sær sjálvum sum longst, um umstøðurnar loyva tí. Og tey yngru av teimum eldru ynskja at fáa ein alternativan bústað, sum júst gevur teimum betri møguleika at verða búgvandi heima hjá sær sjálvum.

Okkara ynski er, at vit kunnu veita okkara eldru borgarum eina breiða viftu av tilboðum, tí hóast tann akutti tørvurin, sum eisini rímiligt er, fyllir mest í myndini, eru tað mong onnur innan eldraøkið, sum hava brúk fyri meira ella minni hjálp, ið veruliga kann muna nógv.

Verða dagtilboðini fleiri í tali, samstundis sum Nærverkið fær størri játtan til heimahjálp, ber til at leggja størri dent á fyribyrgjandi arbeiði, ið kann betra lívsdygdina og beinleiðis tálma vøkstrinum í akutta tørvinum.

Tí er alneyðugt, at kommunurnar nú sleppa í gongd á eldraøkinum, og hetta er serliga galdandi fyri Suðurstreymoy, tí her er tørvurin nógv tann størsti. Lógargrundarlagið má verða í lagi, so vit kunnu sleppa til arbeiðis, uttan at alt málið aftur skal enda sum politiskur kastibóltur.